# ES / EFTA / EBS

oyar og Grønland skuldu verið felags um teirra part av danska limaskapinum. (Hetta er annars eitt krav, sum verður sett í uttanríkispolitisku heimildarlógini).

### Statsrættarligar avmarkingar

Føroyskur limaskapur í EFTA ella ES hevði verið í navni Kongsríki Danmarkar, tí tað er sambært grundlógini stjórnin, sum umboðar Danmark í millumtjóða viðurskiftum.

Henda rætt kann stjórnin kortini lata víðari - og besta dømi um tað eru uttanríkispolitiska heimildarlógin frá 2005. Møguleikarnir og treytirnar eru í stuttum:

1) Henda lóg gevur Føroyum rætt at gera fólkarættarligar avtalur vegna Danmark á økjum, sum eru yvirtikin, og kunnu eisini nýtast til at fáa limaskap í fleirtjóða felagsskapum - t.d. EFTA.

2) Avtalur, sum verða gjørdar við støði í hesum lógum, skulu gerast í navninum "Kongeriget Danmrk for så vidt angår Færøerne".

3) Avmarkingarnar eru, at avtalurnar ikki kunnu fevna um 1) verju- og trygdarpolitikk, 2) avtalur sum skulu galda fyri Danmark, 3) samráðingar sum fara fram innan ein fleirtjóða felagsskap, har Danmark er limur.

4) Skipanin krevur "tætt samstarv" til tess at tryggja, at heildaráhugamál Danmarkar ikki verða skalað.

Er ein av hesum treytum ikki lokin, kunnu lógirnar ikki nýtast.

Men so er spurningurin, um Danmark kortini kann geva Føroyum eina ítøkiliga heimild, tá treytirnar ikki eru loknar. Svarið er ja. Er stjórnin politiskt sinnað fyri hesum, hevur hon víðar heimildar til tað.

### Yvirtikin øki

Sjálvstýri Føroya er byggir á eina grundreglu um, at rættindi ríkispartanna eru avmarkað til egin øki. Uttanríkispolitisku heimildarlógirnar eru avmarkaðar av, at Føroyar bert kunnu gera fólkarættarligar avtalur innan yvirtikin málsøki.

Treytin fyri at Føroyar kunnu umboða Kongsríki Danmarkar í EFTA, ES og EBS-samstarvinum er sostatt, at limaskapurin landafrøðiliga er avmarkaður til Føroya, og at Føroyar hava yvirtikið øll øki innan virkisøki hjá EFTA ella ES, eins og øll tey øki, sum EBS avtalan fevnir um.

Er henda treyt ikki lokin, er tørvur á eini ítøkiligari heimild frá donsku stjórnini. Hetta hevur sjálvsagt serlig stóran týdning, tá viðkomandi málsøki als ikki kunnu yvirtakast.

Tað verður í donskum rætti skilt millum ganga undir fólkarættarligar treytir, og at fremja hesar treytir í verki - sonevnd dualisma. Hetta hevur týdning, tí ítøkiligar heimildir snúgva seg um at ganga undir slíkar treytir, meðan yvirtøka av málsøkjum snýr seg um hvussu treytirnar verða framdar í verki.

Hetta merkir, at stjórnin hevur heimild at geva Føroyum ítøkiligar fólkarættarligar heimildir til at gera fólkarættarligar sáttmálar, hóast viðkomandi málsøki ikki eru yvirtikin. Í forarbeiðingum til lógirnar stendur eisini, at talan ikki er um "en egentlig overladelse af beføjelser", eins og tá málsøki verða yvirtikin.

Tá fríhandilssáttmálin millum Føroyar og Ísland varð undirskrivaður í 2005, ásannaði forsætisráðharrin, at løgmaður kundi fáa eina ítøkiliga heimild, hóast øll viðkomandi málsøki ikki vóru yvirtikin. (Sí svar uppá spurning nr. 2952 frá Høgna Hoydal til forsætisráðharran).

Har fólkarættarligar avtalur fara útum yvirtikin málsøki, kunnu heimildarlógirnar ikki nýtast. Men tað útilokar ikki, at stjórnin kann geva heimastýrinum ítøkiligar heimildir. Men tað kann sjálvandi elva til trupulleikar, um Føroyar skulu hava limaskap í einum altjóða felagsskapi, og øll viðkomandi málsøki ikki eru yvirtikin.

Formur Skulu Føroyar gera fólkarættarligar avtalur, sum verða gjørdar millum statir, krevja heimildarlógirnar, at heitið "Kongeriget Danmark for så vidt angår Færøerne" verður nýtt.

Men í sambandi við eina ítøkiliga heimild, ber til at víkja frá hesum og nýta annað heitið.

Dupult luttøka Heimildarlógirnar gera greitt, at Føroyar ikki kunnu vera við í avtalum, har Danmark longu er við.

Danmark er ikki við í EFTA - men Danmark er bæði við í ES og EBS-avtaluni. Heimildarlógirnar kunnu sostatt bert nýtast í sambandi við EFTA. Spurningurin er, um Danmark kann geva Føroyum eina ítøkiliga heimild til at vera við í ES ella EBS-avtaluni.

Hetta hevði havt við sær, at Danmark fekk dupultan (ella trídupultan) limaskap. Ein, sum snúði seg um landafrøðiliga økið Danmark, og ein, sum snúði seg um landafrøðiliga økið Føroyar (og evnt. ein sum snúði seg um Grønaland).

Í forarbeiðinum til heimildarlógirnar stendur, at ein slík heimild hevði verið í stríð við grundlógina, tí at Danmark bæði statsog fólkarættarliga er eitt fólkarættarligt subjekt.

Hetta er eisini orsøkin til at sagt verður, at Føroyar og Grønland ikki hvør sær kunnu verða limir í altjóða felagsskapum, men mugu verða saman um danska limaskapin.

Men hetta er helst ikki røtt tulking. Tað er rætt, at Danmark ikki kann vera tveir ella tríggir statir í senn og hava tveir ella tríggjar limaskapir í einum felagsskapi. Men tað er møguligt, at Danmark kann hava ein limaskap, sum verður umboðaður av tveimum ella trimum pørtum, sum umboða hvør sín ríkispart.

Hugsanin um at hetta ikki skuldi kunnað latið seg gjørt byggir á eina formalismu, sum er donskum rætti - og serliga heimastýrisskipanunum - fremmand.

At tað ikki skal kunna lata seg gera verður eisini mótprógvað av, at Føroyar, lið um lið við Danmark, gjørdist partur av eini dupultskattaavtalu millum norðurlond.

Samanumtikið kunnu heimildarlógirnar ikki nýtast í avtalum, har Danmark er við. Men Danmark kan helst geva ítøkiligar heimildir til, at Føroyar í slíkum førum umboða ein part av Danmark.

Ríkisins áhugamál Fáa Føroyar slíkar limaskapir, skulu atlit til ríkisins felags áhugamál altíð takast - bæði tá avtalurnar verða gjørdar, meðan tær eru í gildi, og tá tær verða uppsagdar. Alt má tí fara fram í tøttum samstarvi millum ríkispartarnar.

### Svar uppá spurningar

Hvørjar møguleikar hava Føroyar fyri EFTA limaskapi í verandi støðu?

Svar: Føroyar kunnu ikki gerast limir í egnum navni, tí EFTA, fólkarættarliga, er fyri statir.

Men Danmark kann søkja um limaskap í EFTA limaskap av nýggjum. Hetta hevði kravt, at hini EFTA londini góðtaka ein nýggjan danskan limaskap, sum landafrøðiliga bert fevnir um Føroyar. Harumframt skuldu viðurskiftini við ES-limaskapin hjá Kongsríki Danmarkar verið avgreidd. Men er politiski viljin til staðar, ber hetta til fólkarættarliga.

Ríkisrættarliga ber til at nýta uttanríkispolitisku heimildarlógirnar, um øll viðkomandi málsøki eru yvirtikin. Eru tey ikki tað, kann Danmark geva Føroyum eina ítøkiliga heimild.

**Hvørjar møguleikar hava Føroyar fyri EBS limaskapi í verandi støðu?**

**Svar:** EBS-avtalan er bert fyri statir, sum eru ES ella EFTA limir. Føroyar kunnu ikki gerast limir sum Føroyar, og heldur ikki sambært heimildarlógunum. Men Danmark hevur møguleika at geva eina ítøkiliga heimild, soleiðis at Føroyar umboða ein part av limaskapi Danmarkar.

Hetta heldur danska stjórnin ikki bera til, men tað fólkarættarliga ber tað til, um politiski viljin er til staðar.

**Hvussu víðkar ella avmarkar uttanríkispolitiska heimildarlógin møguleikar Føroya fyri EFTA og EBS limaskapi?**

**Svar:** Heimildarlógirnar lata ikki upp fyri øllum møguleikum Føroya at virka í millumtjóða samstarvi vegna Kongsríki Danmarkar. Skulu møguleikar Føroya fyri hesum styrkjast - ella bara varðveitast - krevst, at danska stjórnin eisini gevur Føroyum ítøkiligar heimildir. Fleiri avtalur, sum Føroyar áður hava gjørt, falla uttanfyri heimildirnar í uttanríkispolitisku heimildarlógini.

Lógirnar kunnu nýtast í sambandi við EFTA limaskap, um øll viðkomandi málsøki eru yvirtikin. Eru tey ikki tað, krevst ein ítøkilig hemild.

Lógirnar kunnu ikki nýtast í sambandi við EBS-limaskap, tí tær eru avmarkaðar til avtalur, sum ikki skulu galda fyri Danmark.

**Hvørjar broytingar í løggávu, tulking osv. skulu til, um Føroyar skulu fáa sjálvstøðuga umboðan í EFTA ella EBS?**

**Svar:** Føroyar kunnu bert fáa umboðan í egnum navni, eftir at hava fingið fullveldi. EFTA og EBS kunnu broyta sítt grundarlag, so tað ber til í verandi støðu, men um tað er politiskt sannlíkt, er ein annar spurningur.

Danska stjórnin heldur, at føroyskur EBS-limaskapur stríðir ímóti donsku grundlógini, tí Danmark longu er við, og Danmark bert kann vera eittans fólkarættarligt subjekt. Men hetta er ikki rætt fatan. Statsrættarliga ber EBS limaskapur til, um Danmark gevur Føroyum eina ítøkiliga heimild til hetta.

**Hvørjir møguleikar eru fyri at Føroyar fáa ES-limaskap í verandi støðu?**

**Svar:** Føroyskur limasapur í egnum navni er ógjørligur í verandi støðu. Men tað er gjørligt, at Føroyar, í verandi stats- og fólkarættarligu støðu, kunnu fáa ES-limaskap vegna kongsríki Danmarkar.

Tað hevði kravt serligar tillagingar af sáttmálagrundarlagnum hjá ES, og ein endalig meting má bíða til hesin møguleiki er kannaður nærri. Men hvørki fólka- ella statsrættarliga ber til at vísa møguleikanum frá sær.

Fólkarættarliga er limaskapur bert fyri statir. Skuldi Føroyar fingið limaskap vegna ein part av Danmark, skuldi ES góðkent ein slíkan landafrøðiliga avmarkaðan limaskap afturat hjá einum landi, sum longu er limur. Harumframt skuldi spurningurin um Danmarkar verandi limaskap verið greiddur. Men er politiski viljin til staðar í ES og í teimum einstøku ES-limalondunum, forðar fólkarætturin ikki hesi loysn.

Statsrættarliga kunnu Føroyar ikki fáa limaskap sambært heimildarlógini, bæði tí Danmark longu er limur, og tí Føroyar ikki hava yvirtikið øll viðkomandi málsøki .

Men tað er ikki útilokað, at Danmark verður limur tvær ella tríggjar ferðir, um hvør limaskapur er avmarkaður til ein ávísan ríkispart. Heldur ikki er neyðugt (so sum danska stjórnin heldur), at Føroyar hava limaskap saman við Grønlandi. Tí forðar statsrætturin ikki fyri, at Danmark gevur Føroyum eina ítøkiliga heimild. Í hesum sambandi kundi eitt annað heiti enn "Kongeriget Danmark for så vidt angår Færøerne" verið nýtt.

Tað hevði fingið ávísan praktiskan týdning, at limaskapur Føroya skuldi verið umsitin við atliti til Kongsríki Danmarkar felags áhugamál.

Ein endaligt meting má bíða til hetta er kannað nærri, men hvørki fólkaella statsrættarliga kann møguleikin útilokast frammanundan.

Hvørjar broytingar skulu gerast, um Føroyar skulu kunnu fáa sjálvstøðugan limaskap í ES?

Antin mugu Føroyar fáa fullveldi, ella má sáttmálagrundarlagið undir ES broytast.

## Torradagar í Klaksvík

**Alla komandi vikuna frá 23. Til 28. Februar verða árliga tiltakið "Torradagar" hildið í Klaksvík, har skipað verður fyri ymiskum tiltøkum**

TORRADAGAR
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Í komandi viku leggja klaksvíkingar enn einaferð til brots og seta dagskránna á sín sermerkta og fólksliga hátt. Hesaferð verður tiltakið "Torradagar" hildið í Klaksvík alla vikuna við hópin av spennandi og áhugaverdum tiltøkum frá morgni til kvølds.

Torri stavar frá tí gomlu tíðarrokningini, har hetta var navnið á mánaði, sum byrjaði fyrstu tendring eftir jól og vardi fram til næstu tendring.

Mánaðirnir vórðu kallaðir jóla, torri, góa o.s.fr. Torri verður sett í samband við tvørra, við merkingini "minka". Her verður hugsað um, at mánin er í minking (hvørvandi sól), ella at veturin er farin at halla ella minka. Tá ið tað hevur verið sett í samband við turrur, hevur m.a. verið hugsað um veðrið ta tíðina á árinum.

### Gongur fram móti ljósari tíðum!

Útróðrarmenninir tosa um torrafisk í hesum døgum – tí fiskurin kemur longur inn á grunnin at gýta. Hesa tíðina er fiskurin væl fyri og hevur rogn. Í torratíðini varð etin annarleiðis tilgjørdur fiskur, sum varð fyltur á serligan hátt m.a. við rogni og livur.

Tá ið Klaksvík er fiskivinnuhøvuðsstaður Føroya og annars er nógv knýttur at fiskivinnuni – samstundis sum torratíðin á landi er friðarlig og tom eftir stóru jólahalguna, varð hildið, at tað hevði verið áhugavert at gjørt nakað serligt burturúr hesum tíðarskeiði, so sum tað varð gjørt fyrr og so, sum teir enn gera nógv burturúr í Íslandi.

Ætlanin er at nýta vikuna 23. – 28. februar 2009, har skipað verður fyri ymiskum tiltøkum í Klaksvík. Fyrilestrar um torra, torrafisk og torrahald. Um fiskivinnu og siðir á sjónum. Eisini er ætlanin at skipa fyri fyrilestrum um fiskivinnuna í dag og fáa serfrøðingar frá Fiskiransóknarstovuni at greiða frá fiskivinnuni, sæð frá teirra eygum.